gult cyan magenta svart





# Slovenarnir eru stórund-irhaldarar

*Veikleikin hjá teimum er í verjupartinum, men Allan Simonsen roknar við, at tað verður torført hjá hansara monnum at leggja trýst á*

*Besti møguleikin hjá føroyska landsliðnum er, um teir gloyma at leggja nóg stóran dent á verjupartin, heldur Allan Simsonsen*
***Mynd: Jonhard Hammer***

Seinnapartin í morgin verður farið undir eina nýggja HM undankapping. Allan Simonsen heldur, at tað hevur stóran týdning fyri allar partar, at tað gonst væl fyrstu ferðirnar:

– Fyri spælararnar ber ein góð byrjan styrkt sjálvsálit við sær, og sjálvandi verður tað hugaligari hjá áskoðarunum at fylgja við, um úrslitið verður á einari góðari leið.

*Hvat er tað?*

– Slovenia hevur eitt fínt fótbóltslið. Tað varð aftur undirstrikað 16. august, tá teir vunnu 1–0 í Prag. Vit eru framvegis smáir, men avrikini tey seinnu árini hava verið so mikið góð, at vit altíð eiga at fara á vøllin við vónini og ætlanini um at vinna í hvussu so er eitt stig.

### Framrættaðir

Undir EM endaspælinum í summar var Allan Simonsen í Hollandi og Belgia:

– Eg fylgdi serliga væl við dystunum hjá Slovenia. Spælið hjá teimum var framúr undirhaldandi, og tað kom ikki óvart á meg, at teir stóðu seg so væl. Veikleikin hjá teimum var, at teir allir vóru so ógvuliga fegnir fyri at spæla framrættað. Ímóti Jugoslavia vóru teir frammanfyri 3–0. Jugoslavar vóru undirmannaðir, men teir megnaðu alíkavæl at javna. Slovenararnir høvdu ikki tol og spælarar at leggja seg aftur á vøllin og at taka ferðina úr dystinum. Tí mistu teir sigurin í síðstu løtu.

Allan Simonsen sigur seg vita, at veikleikin hjá slovenunum er í verjupartinum, har tað meiri enn so kemur fyri, at teir gera stórar brølarar, men venjarin heldur møguleikan vera lítlan fyri, at føroyska liðið skal kroysta teir at gera mistøk:

– Vit skulu vera opnir fyri møguleikanum, men spælbýtið fer at koma av sær sjálvum. Teir fara at trýsta okkara spælarar langt aftur á vøllin. Teir hava síðuspælarar á sera høgum støði, og teir hava miðvallarar og álopsspælarar á hægsta støði í Europa. Tí verður okkara lutur fyri tað mesta at vera væl skipaðir og at verja. Men vit fáa í hvørjum dysti málmøguleikar, og tað fara vit eisini at fáa hesa ferð. So er spurningurin, hvussu stór úrtøkan verður.

*Hvussu metir tú mótstøðuliðið í morgin í mun til danska liðið, sum var her fyri tveimum vikum síðani?*

– Slovenararnir spæla meiri undirhaldandi, men teir taka meiri lætt upp á verjupartin.

### Bara smávegis broytingar

Allan Simonsen vil einki siga um, hvussu føroyska liðið fer at síggja út, men hann ætlar sær ikki at gera stórvegis broytingar. Tí er tað rættuliga sannlíkt, at liðið fer at síggja soleiðis út: Jákup Mikkelsen – Hans Fróði Hansen, Óli Johannesen, Jens Kristian Hansen – Allan Mørkøre, Julian Johnsson, John Petersen, Sámal Joensen, Øssur Hansen – Uni Arge, Todi Jónsson.

Sammett við dystum ímóti dønum, so kann tað væl hugsast, at venjarin fer at skifta um, soleiðis at Sámal Joensen verður meiri í vinstra borði, og at Julian Johnsson verður í høgru síðu. Julian var framúr væl fyri ímóti Danmark. Hann breyt ígjøgnum við stórari megi og sannføring, men nyttan burturúr skjótleikanum var ikki optimal, tí hann fleiri ferðir kendi seg noyddan at venda út frá aftur og so leggja innfyri við vinstra beini. Í Sogndal er Julian alla tíðina í høgru síðu, og fyri leiklutin hjá Sámali Joensen – at bakka upp og fylgja bóltføraranum hjá mótstøðumonnunum – hevur tað minni týdning, um útgangsstøðan verður í høgru ella í vinstru síðu.

JH


Marknaðar samskipari
..til TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR



marknaðarføring

produktir

tænastur

**Tryggingarfelagið Føroyar søkir eftir einum fólki til áhugavert starv á Marknaðardeildini.**

***Starvið***
Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar og avbjóðandi, og fevna bæði um innanhýsis marknaðarføring og uttanhysis marknaðarføring av produktum og tænastum felagsins.

***Førleiki***
Vit vænta:
- at tú hevur útbúgving innan marknaðarføring frá hægri handilsháskúla ella líknandi, og/ella praktiskar royndir innan marknaðarføring
- at tú hevur góðan teldukunnleika og dámar væl at arbeiða við kreativum uppgávum
- at tú arbeiðir sjálvstøðugt og dámar væl nýggjar avbjóðingar
- at tær dámar væl at samstarva, og dugur væl at orða teg í skrivt og talu

***Sjálvstøðugt og avbjóðandi***
Vit bjóða eitt sjálvstøðugt starv við góðum møguleikum fyri bæði persónligari og fakligari menning.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Yrkisfelagið Trygdin og AFF.

***Umsókn***
Umsóknir, saman við prógvum og viðmælum, skulu verða Starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi 25. september 2000.
Nærri upplysingar um starvið fáast við at venda sær til Henry Olsen, deildarstjóra, á telefon 345 509 ella 211 715.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
The Faroe Insurance Company

Kongabrúgvin
P.O.Box 329
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 345600
Fax +298 345601
tf@trygging.fo
www.trygging.fo






*Seinast Føroyar skoraðu í altjóða dysti, var tá Uni Arge legði Føroyar framum í dystinum móti Bosnia*

# Tey bíða á Svangaskarði

*Hesar síðstu vikurnar eru 4000 setur sett upp á Svangaskarði, har tað í morgin verður landsdystur fyri 21. ferð*

Football is coming home, sungu tey, tá EM endaspælið var í Onglandi fyri fýra árum síðani. Ivaleyst hava tey somu kensluna á Svangaskarði, sum eingilsktmenn høvdu í 1996.

9. juni í fjør – tá Føroyar megnaðu 2–2 ímóti Bosnia – var 20. landsdysturin á Svangaskarði. Síðani hevur landsliðið spælt fýra ferðir á Tórsvølli.

At tað aftur ber til at spæla landsdystir á Toftum kemst av, at stadion nú lýkur FIFA krøvini um, at áskoðararnir skulu hava hvør sítt setur.

Tær seinastu vikurnar hevur verið nógv virksemi á Svangaskarði. Kvinnur og menn hava sett setur saman og skrúvað, og mitt í vikuni vóur øll 4000 setrini tøk.

Tofta Ítróttarfelag hevur keypt setrini, sum eru blá, úr Danmark. Tey hava áður verið á Gladsaxe stadion, har AB hevur heimavøll. AB hevur altíð havt grønar troyggjur, og í summar skiftu teir lit á stadion. Nú eru stólarnir har grønir.

Niclas Davidsen, formaður í Tofta Ítróttarfelag leggur ikki í at upplýsa, hvussu nógv teir hava keypt setrini fyri. Felagið hevur sjálvt fíggjað ein part, ein partur er fíggjaður við stuðulsinntøkum frá virkjum, skipum og fyritøkum, og so hevur landið stuðla sambært lógarsettu ásetingunum.

### Málini

Føroyska liðið skoraar ikki mál í hvørjum dysti. Í teimum 67 altjóða skrásettu landsdystunum, sum higartil eru spældir, hava føroyingar skorað 40 mál. Tað seinasta varð skorað í Liktinstein 26. apríl, tá Føroyar vunnu 1–0.

Tað seinasta á heimavølli varð skorað ímóti Bosnia 9. juni í fjør. Síðani tá hevur landsliðið spælt fýra ferðir 90 minuttir uttan at fáa mál. Tapini hava verið 0–1 ímóti Íslandi, 0–2 ímóti Estlandi, 0–1 ímóti Litava og 0–2 ímóti Danmark. Hagtølini siga altso, at í morgin fer Slovenia at vinna 1–0!

Í teimum 20 landsdystunum, sum eru spældir á Svangaskarði, hevur landsliðið skorað sekstan mál. Í níggju av teimum 20 dystunum hevur tað ikki eydnast at skora.

JH

# Føroyingarnir hava fleiri royndir

*Samlaða talið av landsdystum hjá føroysku spælarunum er hægri, enn talið hjá slovenunum er*

Tann tíðin er farin, tá føroyska landsliðið var mannað við óroyndum monnum, sum stríddust ímóti mótstøðumonnum, ið høvdu nógv fleiri landsdystir á baki. Teir átjan spælararnir, sum eru í føroyska hópinum, hava tilsaman spælt 474 landsdystir. Slovenararnir hava tilsaman umboðað sítt føðiland 468 ferðir.

Samlaða føroyska talið var upprunaliga 513. Men Jan C. Dam, sum síðani 1989 hevur spælt 39 landsdystir, noyddist at geva avboð. Nýggi maðurin, Johan Byrial Hanssen, hevur ongantíð spælt á landsliðnum.

Orsøkin til at Jan C. Dam týsdagin kendi seg noyddan at geva avboð er trupulleikar við knænum. Tað var um reppið, at Jan Dam ikki var førur fyri at spæla við B68 ímóti gomlu liðfeløgunum í KÍ. Knæið var bundið væl og virðiliga inn, og tá stórsigurin var komin til høldar, tók Jan seg av vøllinum. Hann hevur ikki vant við B68 í vikuni, og stóri spurningurin hjá toftamonnum er, um verjumaðurin verður tøkur, tá teir um eina viku skulu til Runavíkar.

Stór tøl

Jens Martin Knudsen hevur spælt 51 altjóða skrásettar landsdystir. Hann hevur alla tíðina meðan Allan Simonsen hevur verið venjari átt metið, men tað kann hugsast, at Allan Mørkøre kemur undir liðina á honum í morgin. Tað ger Mørkøre maðurin, um hann er á liðnum, og um Jens Martin Knudsen verður á beinkinum.

Um tað gongst, sum tað sær út til, so verður Óli Johannesen næsti maður í lítla 50 dysta liðnum. Í morgin verður superligu maðurin hjá AGF á landsliðnum fyri 46. ferð.

Nógvir aðrir hava ofta verið á landsliðnum: Todi Jónsson hevur spælt 40 landsdystir, Øssur Hansen verður í morgin á liðnum fyri 40. ferð, Jens Kristian Hansen og Henning Jarnskor hava síðani í 1994 umboðað Føroyar 35 ferðir, og landsdysturin í morgin verður tann 35. hjá Juliani Johnsson.

JH



*Óli Johannesen er væl ávegis teimum 50 landsdystunum*